# Taiwan partur av USA

Fyrrverandi taiwanski forsetin Chen Shui-bian hevur nú lagt sak ímóti amerikanska forsetanum, Barack Obama, og amerikanska verjumálaráðharranum, Robert Gates. Chu Shui-bian, sum fyri fjúrtan døgum síðani bleiv dømdur lívlanga fongsulsrevsing fyri svik og onnur lógarbrot, vil vera við, at tað var uppgávan hjá teimum amerikonsku leiðarunum at verja seg. Ta niðurstøðuna er hann komin til, tí eftir hansara uppfatan hevur Taiwan verið ein partur av USA síðani seinna heimsbardaga. Tann 59 ára gamli Chen var taiwanskur forseti frá 2000 til 2008.



# USA broytt kós

Røðan, sum amerikanski forsetin, Barack Obama, helt á ST-aðalfundinum í gjár, var ein greið fráboðan um, at tann nýggja stjórnin í Washington hevur eina heilt aðra uppfatan av ST og altjóða samfelagnum enn stjórnin hjá George W. Bush, forseta. Tað ewru politiskir eygleiðarar á einum máli um. Í røðuni legði Obama dent á, hvussu umráðandi er, at heimsins tjóðir arbeiða saman í ST, tí uttan samstarv fæst einki haldgott úrslit. Sum týðandi øki, ið altjóða samfelagið má loysa, nevndi hann kjarnorkuvápnini, veðurlagsbroytirnarnar og Miðeystur.

# »Manntal« í mótvindi

**Trý feløg harmast nú stórliga valið av orðinum 'manntal' til stóru fólkateljingina, tí orðið ikki umfatar kvinnur eftir teirra tykki. Eisini tey bæði stóru bløðini halda orðið vera sera óheppið**

MÁLKJAK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*




*Sambært »Manntal 2011« og málfrøðingi nýtast kvinnur ikki at kenna seg útihýstar av einum orðið sum manntal, tí tað, eins og onnur orð við 'maður', merkir menniskja*

Hóast stóra fólkateljingin »Manntal 2011« ikki er byrjað enn, hevur verkætlanin longu rent seg í trupulleikar. Fleiri kvinnu- og javnstøðufelagsskapir vilja nevniliga ikki vita av orðinum 'manntal', sum tey halda vera kynsdiskriminerandi. Og onki bendir á, at tey bæði stóru bløðini, Sosialurin og Dimmalætting, eru sinnað at brúka orðið, hóast tað er blástemplað av Føroysku Málnevndini.

### Feløg mótmæla

Tað var annars ikki tí verkætlanini skortaði onnur hugskot, at valið fall á nú umstrídda orðið 'manntal' fyri mest umfatandi føroysku fólkateljingina nakrantíð. Longu í summar vóru bæði Javnstøðunevndin og Kvinnufelagsamskipan Føroya kallaði á fund, har feløgini eisini fingu høvi at siga sína hugsan um orðið 'manntal'. Í skrivi til »Manntal 2011« frá juni mánað gjørdu feløgini greitt, at tey mettu orðið 'manntal' vera sera óheppið, tí tað ekskluderar heldur enn inkluderar, tá talan er um fólk, og ikki bara um mannfólk. Í sama skrivi leggja feløgini fram 15 onnur hugskot til heiti á verkætlanini.

Í skrivi til bløðini í dag, átalar Kvinnufelagið í Havn nú eisini harðliga, at verkætlanin hevur valt at brúka orðið 'manntal' og mælir staðiliga til, at eitt annað orð verður funnið

Eisini blaðstjórin á Dimmalætting, Brynhild Thomsen, varð spurd, hvat hon helt um heitið »Manntal2011«. Heldur ikki hon duldi yvir, at hon helt orðið 'manntal' vera óheppið, og skeyt hon millum annað 'Fólkatal 2011' upp í staðin.

Kortini hava fólkini handan »Manntal 2011« valt at halda fast í orðið, tí tað eftir teirra tykki hevur fleiri fyrimunir enn vansar, sambært Øssuri Winthereig, kunningarleiðara hjá verkætlanini

- Sum eitt tað fyrsta vendu vit okkum til Føroysku málnevndina fyri at vissa okkum um, at orðið er kynsneutralt og also umfatar bæði kvinnur og menn. Eisini halda vit, at orðið er snøgt, og hartil er tað eisini lætt at brúka á til dømis heimasíðuni, har vit sleppa undan føroyskum stavum, sigur Øssur Winthereig.

Í Føroysku Málnevndini váttar formaðurin Jógvan í Lon, at orðið 'manntal' málfrøðiliga er kynsneutralt og í so máta er at líkna við orð sum mannamúgva, mannamunur, mannaføði og líknandi orð, har ein formur av orðinum 'maður' merkir menniskja.

- Tí havi eg heldur ongar fakligar orsøkir til at mæla frá at brúka orðið. Sjálvur haldi eg tað eisini vera stuttligt at blása nýtt lív aftur í eitt gamalt orð sum 'manntal', sigur Jógvan í Lon.

### Skaðar javnstøðutankan

Í Javnstøðunevndini og Kvinnufelagsamskipan Føroya hava kvinnurnar hinvegin ilt við at síggja tað stuttliga í hesum. Og tær góðtaka heldur ikki afturvendandi grundgevingina, at orð við 'mann' hava vunnið hevd í føroyska málinum, tí sum tær siga í skrivinum:

- Hetta vildi verið tað sama sum at sagt, at ójavnstøða millum mann og kvinnu hevur vunnið hevd í føroyska samfelagnum og tískil skal góðtakast.

Feløgini ásanna, at tað kann vera torført at broyta føroyska málið, sum eftir teirra tykki longu er ov dominerað av heitum og orðingum í kallkyni. Men í minsta lagi eiga vit, sum mynda samfelagið í dag, at leggja okkum eftir, at nýggj málnýtsla er kynsneutral. Hetta eiga allir almennir myndugleikar at hava í huga, tá farið verður út til borgaran við einum boðskapi, siga feløgini í skrivinum.

### Bløðini fýlast

Hvussu boðskapurin um stóru fólkteljingina skal berast málsliga, verður ikki minst upp til miðlarnar. Og bæði á Dimmalætting og á Sosialinum hava leiðslurnar longu gjørt sær tankar um, hvørjar trupulleikar eitt orð sum 'manntal' kann hava við sær.

Á Dimmalætting vísir Brynhild Thomsen, blaðstjóri, á, at longu í einum av fyrstu greinunum í blaðnum um »Manntal 2011« skoytti blaðmaðurin í parantes uppí, at 'konufólk verða eisini tald við'.

- Sjálvandi skuldi tað eisini skiljast ironiskt, men hatta sigur nakað um, hvussu illa orðið 'manntal' hóskar í einum modernaðum samskifti, sigur Brynhild Thomsen.

Á Dimmalætting hava tey ongan ávísan málpolitikk, tá tað ræður um at orða seg kynsneutralt, men sjálv er Brynhild Thomsen ikki í iva um, at hon heldur fer at brúka orðið 'fólkateljing'.

Eisini á Sosialinum dámar tíðindaleiðaranum, Eiriki Lindenskov, betri orðið 'fólkateljing'. Hetta orðið er eisini í allar mátar betri í tráð við málpolitisku linjuna á blaðnum, sigur hann.

- Tað er longu langt síðani, at vit gjørdu eina samtykt á redaktiónini um at leggja upp fyri møguligari kynsdiskriminerandi málnýtslu við til dømis at skriva 'landsstýriskvinna ella løgtingskvinna', tá tað snúði seg um eina kvinnu, sigur Eirikur Lindenskov.

Eftir hansara tykki hava miðlarnir skyldu til at ganga á odda málsliga, ikki minst tá málnýtsla kann ávirka ein ávísan hugburð í samfelagnum.

- Eg skilji væl málfrøðiligu grundgevingarnar fyri at brúka orðið 'manntal', men eg haldi framvegis, at orðið er óheppið sæð í mun til stríðið fyri størri javnstøðu. Har havi eg ilt við a síggja tað skilagóða í at brúka eitt orð, sum beinleiðis bendir javnstøðutankan tann skeiva vegin, sigur Eirikur Lindenskov.

Í Kringvarpi Føroya hevur tíðindaleiðarin Jón Brian Hvidtfeldt hinvegin ongar trupulleikar við orðinum 'manntal'.

-Eg dugi illa at síggja, hvussu orðið skal kunna skaða javnstøðuspurningin, tá tað fylgir teimum reglum, sum galda fyri orð, sum umfata bæði mannfólk og konufólk, sigur Jón Brian Hvidtfeldt, sum tó er sinnaður at taka orðið upp til kjak á tíðindadeildini í KvF, um tað gerst neyðugt.

- Eg havi hinvegin ilt við at ímynda mær, at lurtarar og hyggjarar fara at kenna seg stoyttar av orðinum. Fólk eru jú ikki býtt, tey vita væl, at eitt manntal umfatar okkum øll, sigur tíðindaleiðarin.

### Onnur undrast

Eftir øllum at døma gerast tey tó alsamt fleiri, ið undrast yvir, at allir føroyingar nú skulu skrivast í manntal. Frá Jógvani í Lon frætta vit, at sera nógv fólk, millum annað nógvir studentaskúlanæmingar, hava vent sær til hansara og lufta síni undran yvir, at Málnevndin heldur tað vera í lagi at brúka hetta orðið.

Fyribils hevur »Manntal 2011« tó ongar ætlanir um at broyta heitið. Og hóast Øssur Winthereig er greiður yvir, at øll ikki eru líka fegin um heitið, vónar hann ikki, at hetta fer at skaða stóru fólkateljingina.

Tað má tíðin so vísa. Fyribils hevur ein kvinna í almennum lesararabrævi ásannað, at nú føroyingar skulu teljast í manntal, skal hon eftir øllum at døma teljast við eina aðru ferð.